# John Heri roynir seg í Hvidovre

**Tað verður greitt um tvær vikur, um fyrrverandi B68-leikarin fær sáttmála frá danska 1. deildarfelagnum**

ÚTISETAFELAG
*Páll Holm Johannesen*



*John Heri Dam roynir í løtuni at spæla seg til ein sáttmála í danska 1. deildarfelagnum, Hvidovre.*
*Mynd: Savnsmynd*

John Heri Dam hevur síðan januar-mánað vant við danska 1.deildarfelagnum Hvidovre. John Heri er í løtuni í Danmark í útbúgvingarørindum, og samstundis roynir hann at spæla seg til ein sáttmála í Hvidovre

Sambandið millum Hvidovre og John Hera er komið í lag ígjøgnum Frank Skytte. Frank Skytte var venjari hjá John Hera í B68 í fjør, og hann var eisini eitt tíðarskeið venjari hjá Hvidovre.

Hvidovre liggur í løtuni á trið niðasta plássi í donsku 1.deild. Felagið hevur mist heili 10 spælarar í vetrarsteðginum, og tí eru nógvir nýggir leikarar í felagnum.

– Eg fekk ein fyrispurning í oktober frá venjaranum í Hvidovre, sum segði seg mangla leikara í vinstru síðu, og eg helt tað ljóðaði spennandi og valdi at taka av møguleikanum sigur John Heri.

Fyrrverandi B68-leikarin var so óheppin at meiðsla sær fótin í desembur mánað, og tí kundi hann ikki venja við fullari fer, fyrr enn seinast í januar mánað.

-Eg eri í løtuni ikki í eins góðari venjingarstøðu sum hinir leikararnir, tí eg byrjaði at venja ein mánað seinni. Eg vænti tó, at tað gongur ikki rúm tíð, so eg verið líka væl fyri sum hinir leikararnir, greiðir John Heri frá

John Heri hevur leikt tríggjar teir seinastu venjingardystirnar hjá Hvidovre, og tað hevur gingið væl. Sjálvur vónar John Heri, at tað verður til ein sáttmála í Hvidovre, men kappingin er hørð.

Venjarin hjá Hvidovre, Jan Christiansen, hevur boðað frá, at 20 spælarar fara at mynda Hvidovre-hópin í vár. Í løtuni venja 24 leikarar við, og tí skulu fýra sáldast frá.

– Eg vóni sjálvsagt, at eg fái sáttmála, men kappingin er hørð, og tí verður spennandi, hvat fer at spyrjast burtur úr, sigur John Heri at enda.

Jan Christiansen fer at kunngera hópin um tvær vikur, og tá verður spennandi, um enn ein føroyingur verður at síggja í donskum fótbólti.

# Kyndils-venjarin sagt upp

**Rógvi Nielsen segði seg mánakvøldið úr starvinum sum venjari hjá besta kvinnuliðnum í Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er eingin loyna, at gongdin hjá besta kvinnuliðnum hjá Kyndli ikki hevur verið nøktandi í ár. Við tilgongd av fleiri leikarum varð annars roknað við, at nú skuldu tær grønu úr høvuðsstaðnum aftur leggja seg út í oddastríðið í kvinnudeildini, men gongdin á stigatalvuni hevur als ikki staðið mát við høgu málini.

Kyndil er í løtuni á einum fjórða plássi á stigatalvuni, og sunnudagin fingu tær av at vita, tá VB var á vitjan í Havn.

Hetta seinasta var helst eisini tað, sum at enda viðførdi, at venjarin hjá liðnum, Rógvi Nielsen, at enda tveitti handklæðið í ringin, men tað tykist kortini, sum um tað er meira enn hetta, sum liggur aftanfyri.

- Tað er rætt, at eg mánakvøldið boðaði Kyndil frá, at eg ikki longur eri venjari hjá kvinnunum. Sjálvandi hava úrslitini gjørt sítt til, at henda avgerð er tikin, men tað eru eisini onnur viðurskifti, sum liggja aftanfyri.

Meira enn hetta fekst Rógvi Nielsen ikki at siga um uppsøgnina, men sum skilst, so er tað eisini partvíst orsakað av innanhýsis órógv. Í umhvørvinum kring Kyndil hevur órógv kring kvinnuvenjaran leingi verið at hoyrt, og seinnu árini hevur tað ikki verið nakað ókent fyribrigdi í felagnum, at venjarin hevur kastað frá sær í úrtíð.

Enn er ikki endaliga greitt, hvør verður nýggjur venjari hjá kyndilskvinnunum, men tá vit týsdagin royndu at fregnast, var líkt til, at valið fellur á Petur Martin Johansen. Petur Martin er einamest fyri avrik síni á vøllinum við KÍF, har hann í drúgt tíðarskeið taldist millum álitini á liðnum. Men hann er upprunaliga úr Kyndli, har hann eisini endaði sum leikari, tá hann fekk nakrar fáar dystir móti kappingarenda í fjør.

# Føroyar leiktu javnt ímóti Bryne

**Ingi Højsted leikti annan hálvleik ímóti Bryne sunnudagin**

LANDSLIÐI
*Páll Holm Johannesen*

Føroyska fótbóltslandsliðið leikti sunnudagin sín fyrsta venjingardysti sunnudagin. Dysturin var ímóti norska liðnum Bryne, og dysturi endaði 1-1. Sum skilst, so var norska felagið betri í fyrra hálvleiki, meðan føroyingar komu betri við í seinna hálvleiki.

Dysturin var tíggju minuttir gamal, tá Bryne legði seg á odda. 1-0 var eisini hálvleiksstøðan í Spania. Í seinnu hálvleiki svaraði Heðin á Lakjuni aftur við góðum langskoti til endaligu støðuna 1-1.

Miðvallarin, Julian Johnsson, hevur verið darvaður av skaða, og var tí ikki við ímóti Bryne. Jann Ingi Petersen var á miðvøllinum í hansara stað, og í seinna hálvleiki fekk Arsenal-leikarin, Ingi Højsted, eisini møguleikan at royna seg á miðvøllinum.



*Bert 17-ára gamli, Ingi Højsted, slapp rættiliga at royna seg, tá hann fekk møguleikan í seinna hálvleiki ímóti Bryne sunnudagin.*
*Mynd: Savnsmynd*



# Alvi nýtt persónligt met

BOGASKJÓTING
*Tíðindaskriv*



*Alvi Joensen setti nýtt persónligt met í vikuskiftin-um, tá hann vann compound-bólkin fyri børn við 540 stigum*
*Mynd: Per*

**Børn:** Leygardagin 15. februar skipaði Bogaskjótifelagið Tambar í Havn fyri kapping fyri børn á 15 metrum.

Í bólkinum compound gjørdi Alvi Joensen enn einaferð um seg við nýggjum persónligum meti, tá hann trygt vann bólkin við (278+262) 540 stigum, nr. 2 var Alberta Gaardlykke við (271+262) 533 stigum og nr. 3 var Ásmundur Gaardlykke við (260+254) 514 stigum. Øll eru úr Bogaskjótifelagnum Ørvi.

Í bólkinum recurve var javnt í oddinum í steðginum millum Anniku Vang og Eirik í Jákupsstovu, men hendi eitthvørt í seinnu hálvu, sum gjørdi, at Annika vann bólkin væl frammanfyri øll hini við (264+270) 534 stigum. Eirikur bleiv nr. 2 við (259+213) 472 stigum. Bæði eru úr ørvi. Nr. 3 bleiv Bjartur Clementsen, Tambar, við (213+254) 467 stigum.

Eirikur var so óheppin undan kappingini, at bogin brotnaði. Tískil mátti hann læna eina annan boga, sum var nakað tyngri at skjóta við enn hansara egni og kann tað vera hetta, sum hevur verið trupuleikin í seinnu hálvu.



*Hjá teimum vaksnu vann Per Holm Andersen við 568 stigum, seks fleiri enn Schandorff Vang*

**Vaksin**

Sunnudagin skipaði Tambar aftur fyri kapping á 18 metrum, hesuferð fyri tey vaksnu.

Í bólkinum compound legði Per Holm Andersen seg trygt á odda frammanfyri Schandorff Vang við góðari skjóting. Seinna hálva millum teirra var sera jøvn og varð samlaða endaliga støðan, at Per vann við (285+283) 568 stigum, nr. 2 Schandorff við (278+282) 560 stigum og nr. 3 Jóannas Poulsen við (273+275) 548 stigum.

Í bólkinum recurve var javnt millum tey bæði fremstu. Unga Annika Vang førdi tepurt í steðginum frammanfyri einum øðrum afturbyrjaðum ungum skjútta Kristian Niclasen. Javnt gekk á og bleiv endaliga støðan, at Kristian vann við (239+241) 480 stigum, nr. 2 Annika við (246+229) 475 stigum or nr. 3 var Rógvi Mohr við (231+209) 440 stigum.

# Ungir svimjarar venja saman

**Venjingarlega var um vikuskiftið á Tvøroyri. Ungir svimjarar hittust og tað var í roynd og veru ungdómslandsliðið, sum her vandi og hugnaði sær. Hylurin á Tvøroyri er lítil, og tí eru slík tiltøk ikki gerndiskostur á Tvøroyri**

SVIMJING
*Dagfinn Olsen*

Ungdómslandsliðið í svimjing hevur verið saman á venjingarlegu um vikuskiftið. Svimjararnir eru um 10 - 13 ára aldur og legan var ein samanseting av venjing, hugna og ymsum kappingum til gamans, t.d. postarenning.

Svimjararnir vóru eini 30 í tali og komu úr øllum landinum at svimja á Tvøroyri leygardagin og sunnudagin.

Svimjihylurin á Tvøroyri er lítil og stendur ikki mát við tað, ið krevst til kappingar. Hylurin er 12,5 metrar og kravdir eru 25 metrar, um góðkendar kappingar skulu vera í hylinum.

Legan á Tvøroyri endaði sunnukvøldið. Vanliga eru 4 slíkar legur árliga.Mynd: Svimjihylur
Svimjihylurin á Tvøroyri er ov lítil til góðkendar kappingar, og tí eru venjingarlegur ikki gerandiskostur á Tvøroyri.

## Støðan 1. deild

| | Dystir | Stig | Eygur | Umførð | Meðal |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Klubbi | 4 | 57 | 16024 | 720 | 22,26 |
| 2 Vágs Billardfelag | 3 | 34 | 9418 | 540 | 17,44 |
| 3 Billardfelag Kaggin | 3 | 29 | 10216 | 540 | 18,92 |
| 4 Havnar Klubbi | 4 | 18 | 11568 | 720 | 16,07 |
| 5 Tvøroyrar Billardfelag | 2 | 12 | 5548 | 360 | 15,41 |
| 6 Billardfelag Fuglafjarðar | 2 | 12 | 5170 | 360 | 14,36 |

**Støðan 2. deild**

| | Dystir | Stig | Eygur | Umførð | Meðal |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Havnar Klubbi | 3 | 33 | 5396 | 540 | 9,99 |
| 2 Billardfelag Kaggin | 2 | 24 | 4302 | 360 | 11,95 |
| 3 Billardfelag Fuglafjarðar | 2 | 18 | 4218 | 360 | 11,72 |
| 4 Vágs Billardfelag 2 | 3 | 14 | 5154 | 540 | 9,54 |
| 5 Vágs Billardfelag 1 | 1 | 12 | 1846 | 180 | 10,26 |
| 6 Tvøroyrar Billardfelag | 1 | 7 | 1364 | 180 | 7,58 |

**Støðan 3. deild**

| | Dystir | Stig | Eygur | Umførð | Meðal |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Klubbi | 2 | 28 | 3346 | 360 | 9,29 |
| 2 Billardfelag Kaggin | 2 | 26 | 2506 | 360 | 6,96 |
| 3 Vágs Billardfelag | 1 | 16 | 1160 | 180 | 6,44 |
| 4 Tvøroyrar Billardfelag | 3 | 10 | 2834 | 540 | 5,25 |
| 5 Havnar Klubbi | 2 | 10 | 1654 | 360 | 4,59 |

# Klaksvíkingar á gullkós

**Kristian Sune Høgnesen tekur føroyska billardheimin á bóli – koppar keylur sum ongantíð áður**

BILLARD
*Tíðindaskriv*

Tað verður oftani sagt um persónar ella lið í ítróttarkappingum, at man hevur bæði góðar og minni góðar dagar. Hetta passar bara ikki fyri ávísar klaksvíkingar, nevniliga fyri 1. deildarliðið í billard hjá Klaksvíkar Klubba og fyri oddaspælaran har, Kristian Suna Høgnesen. Tað hava hesi bæði seinastu kappingarvikuskiftini so dyggiliga prógvað.

Klaksvíkar Klubbi, sum hevur ligið á odda í billardkappingini frá byrjan, fer eftir øllum at døma eisini at liggja á odda, tá kappingin endar um ikki so langa tíð. Teir tríggir billardsnillingarnir, Kristian Sune Høgnesen, Sonhard Johannesen og tann ungi og lovandi spælarin Ólavur Kjølbro hava gjørt tað aftur. Næstseinasta vikuskiftið tóku teir ímóti einum vælmannaðum Kaggaliði, sum mátti fara so nakkalangt aftur um Lorvíksfjørð við bert fimm stigum. Hini 13 stigini lógu eftir í Klaksvík. Og seinasta vikuskiftið endurtók søgan seg. Vágbingar , sum annars hava ligið sera væl fyri í kappingini, fingu uppaftur størri buksuvatn enn Kaggin. Teir fingu bara 2 stig við sær suður. Klaksvíkar Klubbi hevur 59 stig fyri fýra dystir. Síðani koma Vágbingar við 34 stigum fyri 3 dystir, Kaggin hevur 29 stig fyri 3 dystir, Havnar Klubbi hevur 18 stig fyri 4 dystir, Tvøroyrar Klubbi hevur 14 stig fyri 3 dystir og Fuglafjarðar Billardfelag hevur 12 stig fyri 2 dystir.

Hann kom, hann sá og hann sigraði. Næstan ongantíð áður í billardkapping her heima hevur ein billardspælari livap so væl upp til tey orðini sum Kristian Sune Høgnesen úr Klaksvíkar Klubba. Hesar seinastu dystirnar móti Kagga og Vágs Billardfelag hevur hann verið ein brandur, unikur og ein uppliving fyri allar áskoðarar men ein peli í eyganum á sínum mótspælarum. Og tað eru sjálvandi úrslitini, sum tala.

Í kappingini móti Kagganum hevði Kristian Sune 31,73 eygu í meðal ella meira enn 600 eygu fyri dystin. Besti dystur hansara var uppá 852 og besta umfarið uppá 222.

Var hvøkkurin stórur fyri Jan, Bjarna og Steinbjørn, so skuldi hann gerast enn størri móti Birgir, Gullok og Tórða vikuna eftir. Tá brillieraði Kristian Sune við at spæla við 37,17 eygum í meðal ella góð 700 eygu fyri dystin og 224 eygu fyri besta einstaka umfarið. Hetta er eitt av teimum bestu úrslitunum, sum hava verið í billardkapping hesi seinastu 25 árini kappast hevur verið á skipaðan hátt. Við hesum úrslitinum nýtist hann ikki at smæðast burtur úr millum teir heilt stóru spælararnar, sum hava verið við í kapping, nevniliga René Sørensen og Henrik Petersen.

Kristian Sune hevur spælt billard síðani 1989. Hann skuldi stríðast í nógv ár, áðrenn tað av álvara fór at geva úrslit. Hann var við á liðnum hjá Klaksvíkar Klubba, tá teir vunnu sítt fyrsta føroyameistaraheiti fyri lið í 1997 og síðani hevur tað bara rullað víðari. Klubbin varð eisini FM-meistari í fjør, og sjálvur fór Kristian Sune eisini við gullinum fyri einstaklingar í fjør. Tað var hansara fyrsta og neyvan tað seinasta, heldur henda sigursferðin fram. Árið fyri hevði hann vunnið Haldor Holm kappingina, sum er dreymurin hjá øllum billardspælarum at vinna og ikki minst hjá einum klaksvíkingi. So nú hevur hann verið við til at vinna allar tær stóru kappingarnar - hesin stillføri og avbalanseraði spælarin, sum fær billard at síggja so lætt so lætt út. Hann hevur eitt tempo sum fáur og eina slíka ró yvir køføring og spæl, at tað er eitt fragd fyri áskoðaran, hvørja ferð hann fer aftur til borðið.

Eisini Sonhard og Ólavur hava staðið seg væl í kappingunum. Ólavur hevur eitt meðal uppá meira enn 23 eygu og Sonhard liggur omanfyri 20. Ólavur Kjøbro er ein av komandi stjørnunum í føroyskum billardspæli og hevur ment seg ómetaliga nógv eftir bert stuttari tíð. Hann verður so ein av avbjóðarunum, tá Kristian Sune, liðfelagi hansara skal verja FM-heitið fyri einstaklingar í næsta mánað.